Allan vendir heim

Allan Mørkøre verður nú aftur at síggja á KÍ-liðnum

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Eftir at hava verið í útlegd í hálvt-fimta ár, verður Allan Mørkøre aftur at síggja á KÍ-liðnum, tá farið verður undir aftur fótbóltskappingina.

Leygarkvøldið skrivaðu partarnir undir sáttmála, sum bindur sterka miðvallarnar at barndómsfelagnum komandi árið, og Allan dylur ikki fyri, at tað er við stórum spenningi, at hann nú aftur fer til barndómsfelagið.

Spennandi við Kurt

Ikki minst er tað tann sannroynd, at stóribeiggin, Kurt, stendur við stýrisvølin, sum ger, at hugurin at koma til Klaksvíkar er góður.

– Jú sjálvandi hevur tað nógv at siga. Kurt og hava tosað nógv saman um hetta, og eg veit, at eg stóð ovastur á ynskislistanum hjá honum, sigur Allan um avgerðina.

Sum skilst, so vóru tað fleiri feløg, sum høvdu verið í sambandi við Allan, men nú alt er avgjørt, heldur hann, at avgerðin ikki var so torfør kortini.

– Eg hugsaði sjálvandi nógv um hetta, men tá alt kom til stykkis, so var tað ikki so torført kortini. Sum eg segði, so hevur hetta við Kurt sjálvandi nógv at siga, men eg haldi eisini, at KÍ hevur eitt spennandi lið. Kanska manglar eitt sindur av rutinu, men tað kann eg so vera við til at geva liðnum, og tað gleði eg meg sum sagt til.

Síðani hann miðskeiðis í 1997 fór úr KÍ, hevur Allan fyri tað mesta verið í HB, men hesin sáttmálin verður so ikki longdur.

Um orsøkina til hetta, sigur Allan, at teir í HB vóru ov seinir á sjóvarfallinum, tí sum sagt, so var eitt skifti til KÍ meira lokkandi, nú umstøðurnar lagaðu seg soleiðis.

So fótbóltsfepurin í Klaksvík er helst farin nøkur stig upp hendan mánaðin, nú áskoðararnir aftur hava fingið tveir av sterkastu leikarunum í felagnum aftur.

Allan Mørkøre verður aftur at síggja á KÍ-liðnum komandi ár, har hann saman við beiggjanum, Kurt, skal vera við til at toga felagið nærri fótbóltstindunum, sum annars hava verið so langt burturi seinastu tvey árini

Neistin-Kyndil 18-16 (8-4):

Merkisvert og vánaligt

Ann Hansen var aftur at síggja á Kyndilsliðnum, men heldur ikki hon fekk bøtt stórvegis um spælið í vánaligu grannauppgerðini
Mynd: Álvur Haraldsen

Til tíðir minti dysturin millum kvinnuliðini hjá Neistanum og Kyndli um eina avbronglan av einum hondbóltsdysti, har liðini kappaðust um, hvør kundi gera flestu mistøkini

HONDBÓLTUR – KVINNUR
Jákup Mørk

Hóast kvinnuliðini í høvuðsstaðnum ikki longur hava sama leiklut í fremstu deildini, sum tey høvdu fyri fáum árum síðani, so mundu áskoðararnir tó hava vónir um ein hampuliga góðan hondbóltsdyst millum grannarnar sunnudagin.

Lítið skil á

Tað stóð tó skjótt greitt, at talan so als ikki fór at gerast um nakran væl leiktan dyst, og eitt skifti sá so heldur ikki út til at spenningurin skuldi vera til staðar, men tað venda vit aftur til.

Frá fyrstan tíð sá út til, at Neistin veruliga ætlaði at trumla grannarnar niður. Í verjuni royndu tær at vera framfýsnar, og í álopsspælinum settu tær nógva ferð á, og alt hetta eydnaðist sum so.

Trupulleikin var bara tann, at ferðin varð sett somiki langt upp, at bláu genturnar als ikki kundu fylgja við sjálvar. Ferð eftir ferð fingu tær í verjustøðu fatur á bóltinum, men nærum hvørja ferð endaðu mótálopini við elementerum tekniskum mistøkum, og so kundi alt vera tað sama.

At Neistin so kortini kundi fara til hálvleiks við einari merkisverdari 8-4 leiðslu, kunnu tær takka málverja sínum og kyndilsliðnum sum heild fyri. Helena Dam Poulsen í Neista málinum, tóktist vera sera væl uppløgd, og ferð eftir ferð hevði hon góðar bjargingar, tá kyndilskvinnur vóru komnar í góða skotstøðu, og hetta tók fullkomuliga pippið frá teimum grønu.

Tað hoyrir kanska eisini við hjá einum botnliðið, at tað skal ikki so nógv mótrák til, áðrenn dirvið fellur, og soleiðis tóktist eisini at vera við Kyndli. Eftir at Helena nakrar ferðirnar hevði noktað teimum atgongd til meskarnar, datt alt niðurfyri.

Liðið var annars styrkt til dystin, við tað at Ann Hansen nú aftur var at síggja, men heldur ikki hon kundi venda vónloysinum, sum at enda viðførdi, at Kyndil at kalla einki spæl hevði, men bert royndi seg við panikkskotum, sum ikki í nóg stóran mun hóttu mótstøðumálið.

Gjørdist spennandi

Í seinna hálvleiki helt máttloysi hjá Kyndli fram, men nú gekk nakað betri hjá Neistanum.

Spakuliga togaðu tær seg longur burtur, og støðan hjá Kyndli gjørdist næstan skammilig, áðrenn tær at enda fingu sítt fimta mál. Tá høvdu tær ikki skorað í nærum hálvan tíma. Neistin var komin upp á 12-4, og sjálvt neistavongurin á høllini klappaði, tá so Erla Smith loksins fekk bóltin inn um Helenu.

Stutt undan hesum hevði Kyndil annars sett Maritu Hermansen inn at verja málið, og helst var tað eisini samansjóvan av hesum, og so háanini frá mótstøðuni, sum brádliga fekk Kyndil at rakna við.

Frá teirri løtu, at tær fingu sítt fimta mál, var ein heilt annar vilji at síggja á liðnum. Tær royndu brádliga at stríðast í verjuni, bit kom í álopsspælið, og seigliga byrjaðu tær at toga seg inn á Neistan.

Tað átti helst ongan tíð at komið so langt, men tað eydnaðist so sanniliga Kyndil at skapa spenning aftur í dystin. So hvørt sum munurin minkaði, kom alt meira fjáltur á Neistan, og tað var um reppið, at tær tveittu sigurin burtur, men nærri enn tí eina málinum komu tær hjá Kyndli so ongantíð.

Soleiðis endaði alt við væntaða sigrinum til heimaliðið, men uttan at fara ov nógv í smálutir, so kann bara staðfestast, at tær framyvir mugu vísa nakað væl betri spæl, um tær ætla sær at halda fast um triðja plássið á talvuni.

Hvat Kyndli viðvíkur, so er eitt sindur ilt at siga, hvat skal til. Meira støðugt spæl er í øllum førum eitt gott boð. Sunnudagin skutu tær eitt mál í hálvan tíma, fyri síðani at skjóta 12 í eitt korter, men samanlagt er hetta ikki nóg mikið. Skulu stigini gerast fleiri, má góða korterið í øllum førum leingjast í framtíðini.

Dysturin í tølum

Neistin-Kyndil 18-16 (8-4)
Málskjúttar:
Neistin: Katrin á Neystabø 5(2), Kára á Dunga 3, Birita Wardum 3, Rakul Augustinussen 2, Susan Brockie 2, Mildrid Jacobsen 2, Gunnleyg Berg 1, Annika Thomsen 1
Kyndil: Lotte Sørensen 8(4), Annika Ljósstein 4, Erla H. Smith 2, Linda Weihe 2
Brotskøst: Neistin 2, Kyndil 5
Útvísingar: Neistin 2, Kyndil3
Dómarar úr Tjaldri: Trúgvi Mortensen & Kári Hansen. Høvdu úr at gera við at døma fyri ov nógv fet og dribl!

SÍ-Fram 3-1 (25-22, 25-18, 22-25, 25-20):

SÍ steðgaði Fram

Nú er aftur púra javnt í toppinum hjá monnum, eftir at SÍ sum tað fyrsta liðið megnaði at vinna á Fram

FLOGBÓLTUR
Emil Lisberg Jacobsen

Toppdysturin í Sørvági leygardagin millum SÍ og Fram endaði við sigri til heimaliðið, og tí er spenningurin í toppinum varðveittur fyribils.

Fyri SÍ hevði tað alstóran týdning at vinna dystin. Ein sigur merkti, at teir komu upp á sama stigatal sum Fram, meðan eitt tap hinvegin hevði havt við sær, at munurin øktist upp í fýra stig.

- Tað hevði ómetaliga nógv at siga fyri okkum at vinna dystin, og tað hevði eisini týdning fyri kappingina, sigur Suni Hansen úr SÍ.

Hann vísir á, at um Fram hevði vunnið, høvdu teir farið fýra stig framum, og sjálvt um stigini verða koyrd í helvt aftaná nýggjár, hevði Fram verið tvey stig frammanfyri, tá seinna helvt av kappingini byrjar. Sum nú er, eru liðini jøvn í stigum, og tað verða tey eisini aftaná nýggjár, um henda støðan heldur sær.

Suni Hansen sigur eisini, at teir av tí sama vóru sera uppsettir at vinna dystin leygardagin.

Rúni ikki við

Fram spældi uttan Rúna Weihe. Hann hevur meitt sær fótin, og tað var sum vera man saknur í honum hjá havnarmonnunum. Rúni fyllir nógv á vøllinum, bæði í álops- og verjuspælinum, og uttan hann var Fram-liðið rættiliga skert. Í fyrsta settinum gekk tað kortini sera javnt, áðrenn SÍ vann 25-22, men í øðrum setti høvdu sørvingar góða yvirvág og vunnu eisini hetta settið 25-18.

- Í triðja setti bleiv spælið hjá okkum ov ójavnt. Tað er vanligt, at tað síðsta settið er tungt at vinna, og vit steðgaðu upp, sigur Suni Hansen. Fram vann triðja sett 25-22. Fjórða sett bleiv tað síðsta, tí tað vann SÍ 25-20.

SÍ vann toppuppgerðina ímóti Fram, og so er kappingin í meistaradeildini hjá monnum aftur víðopin
Mynd: Edvard Joensen

Verður millum SÍ og Fram

Sostatt bleiv SÍ fyrsta liðið í kappingini, sum vann móti Fram, men sjálvt um sigurin hevði týdning, so heldur Suni Hansen ikki, at hetta var besti dystur hjá SÍ í ár.

- Nei, tá tað stendur so nógv upp á spæl í einum dysti, verður sjálvt spælið ikki altíð so gott.

Hann heldur annars, at tað fer at standa millum SÍ og Fram í ár.

- Fram er helst betri defensivt og hevur eisini betri blokk, men vit fara sjálvandi eftir fremsta plássinum, sigur Suni og leggur afturat, at um tú ikki ger tað, tá tú hevur liðið til tað, so kanst tú tað sama gevast.

Ein annar fyrimunur hjá Fram í mun til SÍ er, at hópurin hjá Fram er breiðari. Meðan Fram hevur eini 10-11 leikarar at taka av, hevur SÍ bara millum sjey og átta, og gjøgnum eitt langt kappingarár kann tað koma teimum aftur um brekku. Enn eru sørvingar slopnir undan skaðum, og teir vóna sjálvandi at halda fram við tí. Tá hópurin ikki er so stórur, kunnu skaðar oyðileggja nógv.

Fleyr-ÍF 3-1 (22-25, 25-21, 25-20, 25-10):

ÍF enn uttan stig

Hóast teir vunnu fyrsta settið, so munaði hetta lítið hjá ÍF, sum enn eigur fyrsta sigurin í vetur tilgóðar
Mynd: Álvur Haraldsen

Fuglfirðingar vunnu fyrsta sett móti Fleyr, men taptu kortini 3-1. Og í síðsta settinum var munurin stórur

FLOGBÓLTUR
Emil Lisberg Jacobsen

Sætta royndin hjá ÍF at fáa stig miseydnaðist eisini, og í staðin bleiv tað Fleyr, sum fekk tvey kærkomin stig, tá liðini møttust í Havn sunnudagin.

At Fleyr vann, var ikki so óvæntað, tá vit hugsa um gongdina hjá ÍF higartil í kappingini, men tað hevur heldur ikki gingið nakað serligt hjá Fleyr, og tí kundu fuglfirðingar gott hava góðar vónir um, at tað endiliga skuldi eydnast teimum at vinna.

Tað byrjaði eisini væl, tí teir vunnu fyrsta sett 25-22. Fleyr kom so fyri seg og vann tvey tey næstu settini, sum bæði vóru tøtt. Men í fjórða settinum fór ÍF fullkomiliga niður við flagginum - Fleyr vann 25-10.

Fleyr er nú komið upp á fýra stig, og tað eru seks stig upp til oddasessin. Fleyr hevur leikt ein dyst færri enn tey bæði oddaliðini. ÍF hevur einki stig fyri seks dystir, og sum tað sær út nú, enda teir niðast. Men teir koma neyvan í niðurflytingarvanda, tí ÍF er eisini fremst í 1. deild og er favorittur til at vinna deildina.

TB-Mjølnir 1-3 (20-25, 5-25, 26-24, 26-28):

Mjølnir sveiggjar aftur

So steðgaði sigursrøðin hjá TB. Eftir fimm dystir við greiðum sigrum máttu tær lúta fyri Mjølni, ið hevði funnið tær gomlu taktirnar fram aftur

FLOGBÓLTUR
Emil Lisberg Jacobsen

TB-kvinnurnar noyddust sunnudagin at ásanna, at trøini vaksa altso ikki hægri enn til eitt víst. Eftir fimm sigrar á rað máttu tær loksins lúta fyri Mjølni á heimavøllinum í Trongisvági.

Og tá fallið kom, so var tað hart. Mjølnir vann fyrsta sett 25-20 og eisini næsta sett, sum endaði heili 25-5!

Mjølnir var klárt betri, og serliga í næsta settinum høvdu tær TB-kvinnurnar á knøunum. Tær fingu als ikki fatur á servunum hjá Marjuni Kalsø, og ein verulig eyðmýking lá í luftini.

Reistu seg

Men triðja sett háttar seg ofta soleiðis, at liðið, sum hevur vunnið tvey tey fyrstu, tekur sær eitt sindur av løttum, samstundis sum hitt liðið ger ein vørr í eini seinastu roynd at bjarga dystinum. Og soleiðis var eisini her.

TB tók sær um reiggj, og tað eydnaðist teimum akkurát at vinna triðja sett 26-24. Fjórða sett bleiv ein sannur gysari. Mjølnir vann hetta sett 28-26 og hevði tá bjargað tveimum settbóltum hjá TB. Um nú TB hevði vunnið hetta settið, er væl hugsandi, at tær eisini høvdu vunnið dystin, men tað hevði neyvan verið uppiborið, tá vit hugsa um, hvussu leikur fór í øðrum setti.

Av misgávum róptu vit í farnu viku venjaran hjá TB fyri Virgar Dalsgaard. Rætta eftirnavnið skal sjálvandi vera Djurhuus
Mynd: Áki Bertholdsen

Tá líktist TB ikki nøkrum oddaliði, meðan góða gamla Mjølnir var til at kenna aftur. Tær høvdu eisini sterkastu uppstilling við sær til Suðuroyar, og tað merkir, at fleiri av teimum hava nógvar royndir av at liggja í toppinum og spæla týdningarmiklar dystir. Tað hava TB-kvinnurnar ikki, men tað skal sigast til teirra rós, at tær komu sera væl afturíaftur aftaná avsmurningin í øðrum setti. Men kanska var tað kortini royndirnar, sum fingu týdning í avgerandi løtunum.

Nýggjur spenningur

Og úrslitið hevur eisini skapt eitt sindur av spenningi í aftur kappingina. Enn er TB klárt fremst, men nú hevur Mjølnir so víst, at tað ber til at vinna á teimum. Komandi vikuskifti skal TB møta ÍF á Kambsdali í toppdysti. Og tað er eingin ivi um, at sigurin hjá Mjølni ikki hevur minkað um vónirnar hjá ÍF-kvinnunum til næsta leygardag.

Sama dag sum ÍF og TB spæla, tekur Mjølnir ímóti Fleyr í Klaksvík. Og við tí liðnum og tí stríðsandanum, sum klaksvíkskvinnurnar vístu í Trongisvági, kunnu tær sum einki nærkast toppinum aftur.

Tað er bara eitt, sum er avgjørt í kvinnudeildini. Og tað er, at einki er avgjørt enn!

Og heilt til seinast skal so nevnast, at venjarin hjá TB ikki eitur Virgar Dalsgaard, so sum vit av misgávum skrivaðu í síðstu viku. Hann eitur sjálvandi Virgar Djurhuus.